# Ein harður dystur um kr. 7

**Í morgin verður vinnarin í stóru sangskrivarakappingini hjá Atlantic Music Event kunngjørdur á tiltaki í Norðurlandahúsinum, á heimasíðuni ame.fo avdúkar Atlantic Music Event nú hvørji 21 løg eru tilnevnd, og hesin listi vísir bæði kend og nýggj nøvn umfram áhugaverd samstørv.**

ATLANTIC MUSIC EVENT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Ein heppin sangskrivari ella eitt sangskrivarasamstarv fær á samkomu í Norðurlandahúsinum handa vinningin áljóðandi kr. 75.000 at nýta til tónleikaframleiðslu. Atlantic Music Event kunnger á heimasíðuni ame.fo hvørji tey 21 løgini eru, ið eru tilnevnd og sostatt hava møguleika at fara við vinninginum, sum Landstýrismaðurin við Mentamálum handar á tiltakinum í í Norðurlandahúsinum kl. 17.00 í morgin. Jensina Olsen, ið vann Ársins Singer/Songwriter 2006 í Hafnia Lounge og er ein av teimum tilnevndu syngur nakrar sangir á tiltakinum.



## Tey 21 løgini:

Arons Song - Hans Olivur Joensen
Aware of it - Brandur Enni, Lars Kilmann Jansson
Big Shot - Brandur Jacobsen Tórshavn
Dadadie - Búi E Dam
Drain me - Rannvá Jacobsen og Angu Motzfeldt
Dýrdarkvøld - Kári Sverrisson
Fjøllini standa úti - Jens L. Thomsen og fleri
Grát ei - Eivør Pálsdóttir
Kynda Bál - Jensina Olsen
Love is dead - Guðrið Hansen
Mary - Ronni Poulsen
Mín varði - Elin Heinesen
Møttust vit á Penny Lane - Heri Nolsøe
Out on the Road - Trygvi D. Strøm og Kristina renfro
Secrets to conceal - Boys in a Band
Silvurfuglur - Finnbjørn Hansen og KIM Hansen og Jóanes Hansen
So called paradise - Sigrið Rasmussen(Lloyd Garret)
The Cute Little Club - Petur Háberg
Til ein vin - Margreta á Rógvi
Wasted - Lena Anderssen, Bárður Háberg Óli Jógvansson
You got a hero in me - Árni Øregaard
*(Raðfylgjan er alfabetisk, ikki prioriterað eftir stigum)*

*Gu›ri› Hansen hevur tvær fer›ir veri› í uppskoti› til hei›urin besti sangari á Planet Awards, og er millum mest spennandi nøvnini í sangskrivarakappingini.*
*mynd: Jens Kr. Vang)*

### Útlendska dómsnevndin

| | |
|---|---|
| Brynhild Kalsø Hansen | PDH Music DK |
| Helene Broch | Verkætlanarstjóri, Music Export Norway(NO) |
| Jens Ove Friis | Stjóri, Recart Music (DK) |
| Lars Charlie Mortensen | Tónleikábyrgdarfólk og talsmaður, Jelling Festivalen(DK) |
| Sarah-Chanderia | Hacate Entertainment Group USA/NO |
| Kathrine Bækkevold | Produkt Leiðari: Interscope, Geffen, A&M, Universal US, Motown, Dreamworks (NO) |
| Peter Møller Madsen | Tónleikábyrgdarfólk og talsmaður, Nibefestivalen(DK) |
| Birgitte Mandelid | Tónleikatíðindafólk og vegna Øyafestivalen (NO) |
| Michael Callesen | Rosa - Dansk Rock Samråd(DK) |
| Ásgeir Eyþórsson | Promotari og tónlistasamskipari í Reykjavík(IS) |
| Poul Henrik Jensen | DJBFA(DK) |
| Þorvaldur Bjarni Þorvaldsson | Tónleikari, sangskrivari, sangari í "Todmoblie" (IS) luttikið í Eurovision fleiri ferð |

### Góð og spennandi nøvn

Her er talan um nøkur av fremstu føroysku tónleikanøvnunum, nøvn, ið longu hava staðfest seg á føroyska tónleikatindinum so sum Eivør, Lena, Kári Sverrison, Brandur Enni, Elin Heinesen, Kim Hansen, Sigrið Rasmussen og vinnarin av nærum øllum sangkappingum higartil Heri Nolsøe. Men eisini um spennandi nýggj nøvn, ið hava gjørt vart við seg seinastu tíðina, sosum Boys In A Band, Guðrið Hansen, Jensina Olsen, Búi Egason Dam, Petur Háberg, Brandur Jacobsen og Margreta á Rógvi.

### Spennandi samstørv

Her eru eisini nøkur spennandi samstørv, so sum Finnbjørn Hansen, Kim Hansen og Jóanes Hansen, umframt Lena Anderssen, ið samstarvar við føroysku hittsmiðirnar Bárð Háberg Óla Jógvansson. Nøkur av samstørvunum røkka eisini útum klettarnar, eitt nú Brandur Enni, ið samstarvar við svian Lars Kilmann Jansson, Rannvá Jacobsen, ið hevur skrivað lag sítt saman við grønlendsku sup-er stjøruni Angu Motzfeldt, og Trygvi D. Strøm, ið hevur gjørt lagið saman við danska bólki sínum Kristina renfro.

Harumframt eru fleiri nøvn, ið eru meira ella minnið kend, so talan tykist at vera um eina spennandi kapping, við úrslitið, ið sera ringt er at spáa um.

### Valdu tey 21 løgini

Ein føroysk dómsnevnd lurtaði eftir teimum 515 minuttunum av innsendum tónleiki, tilsaman 124 løg. Tey, ið mannaðu føroysku nevndina vóru: Niels Halm, Hergeir Eldevig, Anna Katrina Petersen, Kaj Johannesen, Jón Tyril, Sólvá Ford, Gissur Patursson, Píl Reinert, Linda Petersen, Steintór Rasmussen, Høgni Zachariasen og Elin Hentze.

Hvør í sínum lagi valdu nevndarlimirnir tey 20 løgini, sum tey persónliga hildu áttu at koma víðari. Løgini eru vald í tilvildarligari raðfylgju. Um onkur hevði sent inn 2 uppskot, er tað uppskotið, sum hevur fingið flestar atkvøður, ið er farið víðari. Ætlanin var at velja 15 løg, men orsakað av, at stigatalið hjá fleiri lagskrivarum var tað sama, vóru 21 løg vald.

### Útlendsk dómsnevnd

Ein útlendsk dómsnevnd hevur nú lurtað eftir løgunum, og limirnir í hesi nevnd hava hvør í sínum lagið valt tey 10 bestu løgini, og nú er ein vinnari funnin. Henda dómsnevnd er mannað við limum úr Danmark, Noregi og Íslandi, ætlanin var eisi-